SJÓVINNUSTÝRIÐ
FAROESE MARITIME AUTHORITY

Dagfesting: 08-06-2023

# UPPSLAG

## Burturbeining av burturkasti frá førum undir 15 metrar

sambært kunngerð nr. 122 frá 25. november 2005 og kapittul XXV í Fráboðan frá Sjóvinnustýrinum F

Burturkast, sum tað sambært niðanfyri nevndu talvu ikki er loyvt at koyra í havið, skal goymast umborð, og avhendast til móttøkuskipan á landi

| Slag av burturkasti | Burturbeining á føroyskum sjóumveldi (12 fjórðingar úr grundlinjuni) | Burturbeining uttan fyri føroyskt sjóumveldi (meira enn 12 fjórðingar úr grundlinjuni) |
|---|---|---|
| Alt tilfar úr plasti, herundir togverk, nylon, net og annar fiskireiðskapur og plastposar | Bannað | Bannað |
| Lutir, ið flóta, so sum dunnage, fóðrings- og pakkitilfar | Bannað | Meira enn 25 fjórðingar úr grundlinjuni |
| Annað burturkast sum matburturkast, pappír, klædnatilfar, steintoy og tílíkt | Bannað, tó kann matburturkast burturbeinast í havið 1 fjórðing úr landi | Meira enn 12 fjórðingar úr grundlinjuni |

Omanfyri nevndu forboð og avmarkingar fevna ikki um burturbeining av fiski og slógvi í sambandi við viðgerð umborð á fiskiførum

## Burturbeining av olju frá førum undir 15 metrar

sambært kunngerð nr. 124 frá 25. november 2005 og kapittul XXI í Fráboðan frá Skipaeftirlitinum F

Olja og oljudálkaður sjógvur ella vatn, sum tað sambært niðanfyri nevndu talvu ikki er loyvt at koyra í havið, skal goymast umborð, og avhendast til móttøkuskipan á landi

| Burturbeining á føroyskum sjóumveldi (12 fjórðingar úr grundlinjuni) | Burturbeining uttan fyri føroyskt sjóumveldi (meira enn 12 fjórðingar úr grundlinjuni) |
|---|---|
| Bannað | Burturbeining av olju og oljudálkaðum sjógvi ella vatni úr maskinrúmi er bannað, uttan so at allar niðanfyri nevndu treytir eru loknar:<br>1. Skipið siglir<br>2. Nýtt verður góðkend reinsi- og eftirlitsútgerð ella onnur góðkend útgerð<br>3. Oljuinnihaldið í blandingini, uttan tynning, er minni enn 15 ppm (parts per million) |

## Burturbeining av kloakkspillivatni frá førum undir 15 metrar

sambært kunngerð nr. 123 frá 25. november 2005 og kapittul XXIV í Fráboðan frá Skipaeftirlitinum F

Kloakkspillivatn, sum tað sambært niðanfyri nevndu talvu ikki er loyvt at koyra í havið, skal goymast umborð, og avhendast til móttøkuskipan á landi

| Um kloakkspillivatnið er *óviðgjørt* | Um kloakkspillivatnið er *viðgjørt* í góðkendari skipan, og spillivatnið ikki gevur sjónliga slóð í sjónum |
|---|---|
| 1 fjórðing úr landi | Eingin avmarking |